# Grannadystur við Løkin

**Fótbóltur:** Tað er ikki á hvørjum degi, at tvey lið í Formuladeildini úr somu kommunu hittast til dyst á eini summarstevnu á bygd.

Lagt er upp til ein spennandi dyst, tá bestu mansliðini hjá NSÍ og Skála hittast til dyst í Runavík leygardagin kl. 18:30.

Í løtuni er støðan hon, at NSÍ liggur sum nr. 4 og Skála sum nr. 7 í Formuladeildini. Hóast stutt er millum liðini á stigatalvuni, hevur tað kortini skorist ójavnt hjá teimum báðum higartil í ár. NSÍ hevur nevniliga 21 stig og Skála bert 11.

Kortini er einki avgjørt í hesum dystinum fyrrenn dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð.

**sb.**



*Besta liðið hjá NSÍ klárar seg væl í Formula-deildini, og tað ger dreingjaliðið hjá felagnum eisini. Teir spældu um vikuskiftið í Sandavági og taptu 4-0, men liggja kortini í ovara enda á kappingini. Hesir báðir hava eisini stóran áhuga fyri fótbólti*






# Ein góður boðskapur til gott endamál

**Eins og síðsta ár verður skipað fyri stórari og spennandi gospelkonsert á Eystan-stevnu. Konsertin verður hildin í ítróttar-høllini í Runavík fríggja-kvøldið.**

**Millum luttakararnar er Kristina Bærentsen, dóttir Alex Bærentsen**

KONSERT

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Runavík:** Fleiri kend nøvn innan gospeltónleik í Føroyum koma at luttaka.

Tey luttakandi eru: Kristina Bærentsen, Martin Joensen, Laila, Vanja og Barbara, Systkini Steinhólm av Toftum og Løgtings- og Landsstýriskór, umframt dugnaligir tónleikarar sum fara at hita upp áðrenn sjálva konsertina.

Tað er Blái Krossur Føroya, ið skipar fyri konsertini. Odd Færø, fíggjarleiðari, sigur í stuttari viðmerking, at endamálið fyrst og fremst er at fáa ein góðan boðskap út á ein positivan hátt.

– Hetta verður gjørt bæði við sangi, men eisini við andakt og við stuttari kunning um hjálpararbeiðið hjá felagsskapinum.

– Harafturat vóna vit, at tiltakið fer at geva eitt gott íkast til raksturin av felagsskapinum, sigur hann.

Konsertin byrjar í ítróttarhøllini fríggjakvøldið kl. 20. Konsertin verður so fjølbroytt og spennandi sum tað letur seg gera, við tað at teir einstøku bólkarnir og solistarnir luttaka við millum trimum og fimm sangum hvør.

**Søla av listaverkum**

Beint eftir gospelkonsertina í Ítróttarhøllini – ella umleið kl. 22.30, skipar Blái Krossur fyri eini spennandi uppboðssølu. Her verður høvið hjá fólki at bjóða uppá málningar frá fleiri av mætastu málarunum í landinum.

Nevnast kunnu Sámal Toftanes, Øssur Mohr, Heðin Kambsdal, Hilmar Højgaard, Oggi og aðrir.

Dugnaligir uppboðssøluhaldarar fara at gera sítt ítasta at uppboðssølan gerst bæði spennandi og áhugaverd fyri bæði tey sum velja at stuðla hjálpararbeiðinum hjá Bláa Krossi við keypi og tey sum lýða á.

Øll eru vælkomin at verða við til málningauppboðssøluna, eisini tey, ið kanska ikki vóru og lýddu á gospelkonsertina beint frammanundan.


